# ð sínari fráveru



*Sambært fyrireikarunum gekk bjargingarvenjingin væl, men tað skerst ikki burtur, at fráveran av Landssjúkrahúsinum og ambulansutænastuni setti síni spor á venjingina*
*Mynd: Jens Kristian Vang*





kenslu av, at samskiftið fór nøktandi fram.

- Eg havi tosað við nakrar av politistunum, sum hava verið við í venjingini, og sum eg skilji á teimum, eru teir væl nøgdir við tað, sum er farið fram í dag, sigur Jón Klein Olsen.

Hann sigur eisini, at hóast tað var stórt spell, at Landssjúkrahúsið ikki fekk verið við, tí teir eru ein náttúrligur partur av einari slíkari venjing.

- Men hetta gevur okkum samstundis møguleika at læra nakað. Vit hava verið noyddir at hugsa alternativt, tí hvat hevði hent, um ein slík vanlukka hendi og Landssjúkrahúsið var fult upptikið við øðrum vanlukkum. Nú bar so væl á, at Triton var tøkur og gjørdist hann tí ein partur av venjingini og fungeraði sum hospitalsskip, sigur Jón Klein Olsen.

Enn hevur eingin evalueringsfundur verið annað enn ein, sum var í morgun. Og ikki fyrr enn nakrir dagar eru gingnir ber fyrireikarunum til at siga, hvat endaliga úrslitið av bjargingarvenjingini gjørdist.